# Rúsdrekka seinastu øldina

**Í ár eru 100 ár liðin síðan fólkaatkvøðuna um rúsdrekkasølu, tá kvinnur fyrstu ferð høvdu valrætt í Føroyum**

**SØGA**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Mangt broytist á mansins ævi. Nú vit skriva ólavsøka 2007, kunnu fólk sita uttan fyri eina matstovu og njóta eina kalda bjór, meðan tænarar syrgja fyri, at borðini eru rein og nosslig.

Harafturat hava kvinnurnar valrætt. Og summar bjóða seg enntá fram til at verða stjórar og sendimenn. Ja, sjálvt kvinnur kunnu gerast umboðsmenn.

Men hvat hevur hetta við hvørt annað at gera? Jú, fyri øld síðan var støðan ein heilt onnur.

Í ár eru liðin 100 ár, síðan fólkaatkvøða var um rúsdrekkalógina, har kvinnurnar spældu ein avgerandi leiklut. Tær sluppu nevniliga fyri fyrstu ferð í Føroyum at atkvøða. Valaldurin var 20 ár. Ofta hevur verið róð framundir, at tað vóru kvinnurnar, ið forðaðu fyri, at menn sluppu at selja allar jarðarteigarnir burtur fyri at fáa sær eina kenning, men úrslitið hevði tó helst verið tað sama, um bert menn sluppu at atkvøða.

Mong hildu nevniliga, at rúsdrekka skuldi bannast fullkomiliga, men tað endaði við, at atkvøðan kom at snúgva seg um, hvørt rúsdrekka skuldi verða selt í hvørjari sókn sær ella ikki.

Fýra punkt vóru á atkvøðuseðlinum, men til spurningin, um rúsdrekka skuldi seljast í Føroyum, atkvøddi bróðurparturin ímóti. Eisini av kvinnunum. Eitt nú í Havn høvdu 820 fólk valrætt. Av teimum atkvøddu 20 ja, meðan 613 atkvøddu ímóti sølu av rúsdrekka.

Rúsdrekka setti eisini sín dám á tjóðskaparspurningin, og eitt nú førdi Dimmalætting fram í 1906, at málið um fráhald ella rúsdrekka átti at vera grundarlag fyri floksbýti í Føroyum. Blaðið himpraðist ikki við at áhaldandi brúka heitini »brændevinspartiet« um sjálvstýrismenn og »afholdspartiet« um sambandsflokkin. Jørgen-Frantz Jacobsen, sum m.a. var søgufrøðingur, vildi enntá vera við, at tað var rúsdrekkamálið sum førdi til, at tjóðskaparrørslan fór í tvíningar og bleiv partapolitisk.

Alkohol hevur altíð verið eitt eldfimt evni. Ikki minst politiskt. Í 1973 varð aftur útskrivað fólkatkvøða, m.a., um Føroyar skuldu hava einkarsølu. Uppskotið fall.

Í 1980 fingu føroysku bryggjaríini loyvi til at bryggja øl við styrki upp til 5,8 %, og í sama viðfangi varð innflutningur av øli, sum var sterkari enn hetta, bannaður, og gullølið var skamtað.

Í 1988 varð reglan um, at fólk skuldu hava goldið skatt, sum síðan 1928 hevði verið treyt fyri at kunna keypa rúsdrekka, avtikin. Í 1991 setti Løgtingið stóra nevnd at fyrireika nýggja rúsdrekkalóg. Lítil undirtøka var fyri at skipa fyri enn eini fólkaatkvøðu um málið.

10. mars 1992 kom »Løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka í Føroyum« í gildi, og í november sama ár læt Rúsdrekkasøla landsins upp – vanliga nevnd Rúsan.

Men hóast heitið fyri ein føroyskan parlamentslim sambært stýrisskipanarlógini framvegis er tingmaður, kunnu bæði kvinnur og menn sita uttandura á ólavsøku 2007 og njóta ein svalandi drykk í túninum uttan fyri eina matstovu. Og væntandi fara bæði kvinnur á menn á løgtingsval um ikki so nógvar mánaðir.

*(Keldur: Rúsdrekka – siðir og ósiðir, Elin Súsanna Jacobsen, 1995*
*Støðisrit um Rúsdrekka, 1973*
*Danmark og Færøerne, Jørgen-Frantz Jacobsen, 1927)*



# Uttandura skeinking á ólavsøku

**Á ólavsøku í ár sleppa skeinkistøð fyri fyrstu ferð at skeinkja uttandura. Loyvisnevndin vildi tó ikki loyva skeinking undir kappróðrinum. Annað av støðunum, ið hevur fingið uttandura skeinkiloyvi er Hvonn, og har kundu tey hugsað sær, at ólavsøkan var meira sjónlig í Vágsbotni**

**SKEINKING**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Ólavsøkan í ár verður tann fyrsta í mannaminni, har skonkt verður uttandura. Ikki tí, tað er ikki ókent at menn – og kanska kvinnur – leita sær aftur um ein hjall og kaga inn um vestin. Ella ganga við einum heilum ølkassa millum sín.

Men eftir at ein nýggj kunngerð kom í gildi fyrr í ár, sum loyvir matstovum og barrum skeinking uttandura, hava tvey støð í Havnini fingið loyvi til at skeinkja í túninum.

Tey eru ávikavist Hvonn og Glitnir.

Anna Dam, løgfrøðingur og forkvinna í loyvisnevndini, sigur við Sosialin, at talan verður ikki um, at fleiri uttandura skeinkiloyvi verða givin til hesa ólavsøkuna.

Forkvinnan váttar, at umsóknir eru komnar inn til loyvisnevndina um at sleppa at skeinkja á kaiøkinum undir kappróðrinum ólavsøkuaftan. Hetta hevur nevndin tó valt at havna, av tí at mett verður, at tað verður trupult hjá fyriskiparunum at halda skil á. M.a. er torført at verja seg fyri, at annar sterkur løgur ikki verður drukkin á økinum samstundis. Harafturat er talan um eitt ítróttartiltak, verður sagt frá loyvisnevndini.



*Ein góðveðursdag uttan fyri Kvonn í Vágsbotni*

## Fleiri tiltøk oman í Vágsbotn

Johannes Jensen, stjóri á Hotel Tórshavn, ið hýsir Hvonn, sigur, at á ólavsøku verður opið til klokkan 4 um morgunin.

Sjálvur sigur hann seg vóna, at ólavsøkan fer at nærkast Vágsbotni meira, enn hon hevur gjørt undanfarin ár.

– Eg vóni at síggja fólk og tiltøk í Vágsbotni. Tað er ikki fyri at tjena pengar. Alt gott um Kommunuskúlagarðin, men fleiri tiltøk áttu at verið á Vaglinum, í Vágsbotni og oman móti Café Natúr, sigur Johannes Jensen. Hann leggur afturat, at sambært honum átti fleiri tónleikatiltøk at verið í Vágsbotni, ið liggur beint við Tórsgøtu, har m.o. Tjóðpallurin og Margarinfabrikkin halda til.

– Og so er tað sjálvur Vágsbotnur, har bátar liggja og fólk gista í bátum.

– Hetta líkist eini bátastevnu, sigur hotellstjórin um ólavsøkuna og heldur fyri, at tey á gistingarhúsinum bert eru ein lítil partur av hesum.

Seinastu árini er vorðið alt meira vanligt, at fólk vilja royna útlendskt øl av ymiskum slagi. Hetta rákið er eisini komið til Hvonn, sum hevur 11 ølkranar í nýtslu.

– Vanliga sigur man, at fleiri enn tríggir ølkranar geva problemir, men vit hava 11 ølkranar, sum ganga væl, og tað er stuttligt, sigur Johannes Jensen, ið vil vera við, at ofta eru tríggir kranar 90% av søluni, men at so er ikki á Hvonn. Umframt føroyskt øl ber eisini til at royna hesi sløgini uttandura á ólavsøku í ár. Tó er avmarkað við sitiplássum í túninum uttan fyri Hvonn.

Johannes Jensen sigur, at hotellini í høvuðsstaðnum eru fullsett, tá landsdystur í fótbólti og fiksivinnustevna er. Og so sjálvandi eisini á ólavsøku.